## United sum ársins lið

Umframt at kjósa ársins spælara, setti PFA eisini ársins lið í Premier League. Og her gjørdist talan um eitt lið, ið mest sum kann metast sum eitt styrkt Manchester United. Ikkiu færri enn 8 spælarar á liðnum koma frá verandi oddaliðnum. Hesir eru Edwin van der Saaar, Gary Neville, Nemanja Vidic, Rio Ferdinand, Patrice Evra, Ryan Giggs, Paul Scholes og Cristiano Ronaldo. Hinir tríggir á liðnum eru Steven Gerrard (Liverpool), Didier Drogba (Chelsesa) og Dimitar Berbatov (Tottenham).



## Serligur heiður til Ferguson

Alt íalt gjørdist talan um sanna sigursgongd hjá Manchester United, tá enska spælarasambandið hevði sína gallaveitslu. Ronaldo var sjálvandi stóra stjørnan, men eisini venjarin hjá felagnum varð heiðraður. Sir Alex Ferguson hevur nevnliga sitið í heita sessinum á Old Trafford í 20 ár. Tað er í sjálvum sær nakað heilt serligt, og minni gerst heiðurin ikki, tá hugt verður at steypunum, sum skotin hevur drigið til Manchester á vegnum.




# Í einum flokki fyri seg

**22 ára gamli Ronaldo hevur bergtikið alt og øll hetta kappingarárið. Sunnudagin varð kosin sum besti spælarin í enskum fótbólti og besti ungi spælari**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta er fyrsta ferðin í 30 ár, at ein og sami spælari hevur vunnið báðar virðislønirnar. Í 1977 vann táverandi Aston Villa spælarin – og núverandi SkySports-frásøgumaðurin – Andy Gray nevnliga sama heiður.

*Tað sigst, at Barcelona hevur boðið tað, sum líkist 600 mió kr. fyri Ronaldo. Men tað freistar als ikki Manchester United, sum júst hevur gjørt nýggjan sáttmála við Cristiano Ronaldo*

### Styrktur av mótgongd

Talan var annars ikki um best hugsandi byrjan hjá Ronaldo, tá hol varð sett á ensku Premier League. Portugisin var beinleiðis orsøkin til, at Wayne Rooney varð rikin av vølli, tá Ongland tapti fyri Portugal í HM-kappingini, og tað góvu ensku áskoðararnir eisini til kennar.

Hvønn tann einasta útidyst ýldu áskoðararnir eftir Ronaldo, men einasta ávirkanin, sum hetta tóktist at hava, var at spæl hansara gjørdist enn betri. Við skørpum driblingum, nógvari ferð og hópin av málum hevur hann verið kanska mest týðandi orsøkin til, at Manchester United í ár hevur góðar møguleikar at taka gullið frá Chelsea. Og so skal altso hugsast um, at spælarin enn bert er 22 ára gamal.

### Met-keyp

Tey vóru annars mong, sum hildu Sir Alex Ferguson hava mist høvdið, tá hann í 2003 legði 130 milliónir krónur á borðið fyri teenager'an úr Sporting Lissabon. Hetta var met fyri ein somikið undan spælara, og fleiri tosaðu um, at hetta var eitt »troystarkeyp« hjá Ferguson, tá tað ikki eydnaðist at keypa Ronaldinho, sum ístaðin valdi Barcelona.

Men kritisku røddirnar eru tó tagnaðar. Ikki minst í ár, har talentið hevur spælt á einum støðugt høgum støði. Einum støði, sum hevur lyft hann upp um allar aðrar hetta kappingarárið. Og Alex Ferguson hevði eisini tær stóru rósurnar frammi, tá hann varð spurdur um manni við 7-talinum. »Í løtuni haldi eg, at hann er besti spælarin í heiminum, og avrik hansara í ár hava verið ótrúlig«.

# Havnar Fimleikafelag vann alt

**Føroya Fimleikasamband skipaði saman við Fimleikafelagnum Støkk av Glyvrum fyri B-kapping í estetiskum fimleiki í ítróttarhøllini í Runavík leygardagin**

FIMLEIKUR
*Lív Reinert Kjeld*
*liv@sosialurin.fo*

Leygardagin var ítróttarhøllin í Runavík karmur um B-kapping í estetiskum fimleiki fyri gentur, smágentur og pinkur. Fimm lið kappaðust, og hóast talan var um eina B-kapping, var fimleikaliga støðið rættiliga høgt, og nógvu áskoðararnir, ið høvdu leitað sær til Runavíkar, fingu eina framúr góða fimleikauppliving.

Liðini, ið kappaðust, vóru frá trimum teimum størstu fimleikafeløgunum í landinum, nevniliga Havnar Fimleikafelag, Ljósinum og Støkk. Havnar Fimleikafelag var einasta felag, sum hevði teknað lið til allar kappingarnar, meðan Støkk og Ljósið bert luttóku við einum liði í part. Sostatt var einki ivamál um, hvør fór at vinna, tá ið pinkurnar og genturnar vóru á gólvinum; men stórur spenningur var til kappingina hjá smágentunum.

Liðini høvdu øll kappast fyrr í steypakappingini, sum var í Klaksvík í januar, men nógv kann henda eftir tríggjar mánaðar við nógvari og harðari venjing. Í Klaksvík vunnu smágenturnar hjá Støkk á Havnar Fimleikafelag við einans 0,2 stigum. Ljósið var tá aftan fyri við umleið einum heilum stigi. Úrslitið leygardagin gjørdist, at Havnar Fimleikafelag streyk avstað við sigrinum. Nógva venjingin gav úrslit, og tær fingu 0,4 stig fleiri enn Støkk. Ljósið endaði aftur hesaferð á triðja plássinum, men øll trý liðini betraðu nógv um stigatalið samanborið við kappingina í januar.

Næsta kappingin í estetiskum fimleiki, sum er á skránni, er kappingin um føroyameistaraskapin, sum verður í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn leygardagin 5. mai. Tá verða tað A-liðini hjá pinkunum, smágentunum og kvinnunum, ið fara at kappast. FM-kappingin fyri gentur var fyrst í mars, og tá var tað eisini Havnar Fimleikafelag, sum vann.




*Øll trý liðini hjá Havnar Fimleikafelag komu heim aftur við gulli um hálsin og steypi í hond*

### Úrslitini

**Pinkur**

| Nr. | Felag | Tøkniligt | Listarligt | Framførsla | Samanlagt |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HF | 3,77 | 2,03 | 6,00 | 11,80 |

**Smágentur**

| Nr. | Felag | Tøkniligt | Listarligt | Framførsla | Samanlagt |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HF | 4,50 | 2,57 | 7,25 | 14,32 |
| 2 | Støkk | 4,20 | 2,67 | 7,05 | 13,92 |
| 3 | Ljósið | 4,30 | 2,27 | 6,35 | 12,92 |

**Gentur**

| Nr. | Felag | Tøkniligt | Listarligt | Framførsla | Samanlagt |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HF | 3,27 | 2,30 | 6,70 | 12,27 |